**Úrskrift úr dómbókini**

# ÚRSKURÐUR

Gjørdur tann 5. oktober 2010 av Yvirútskiftingarnevndini í máli nr. 1/2009:

**Útskifting av Fyri Oman Rætt, Gjáar bygd**

Útskiftingarnevndin hevur gjørt úrskurð í málinum tann 27. mai 2009.

Eftir úrskurðinum verður hagin býttur sundur í hagapartin, Fjallið, og hagapartin, Ambadalur.

Málið er (tann 26. august 2009) av eigarum í hagapartinum, Fjallinum, kært við kravi um, at markið millum hagarnar verður sum ásett í uppskoti frá Útskiftingarnevndini frá 24. februar 2009.

Málið er somuleiðis (tann 27. august 2009) av eigarum í hagapartinum, Ambadalur, kært til Yvirútskiftingarnevndina við kravi um, at markið verður sum nærri ásett í tveimum kortum, sum eru heft við kæruni.

**Grundgevingarnar hjá pørtunum:**

Eigararnir í hagapartinum Fjallinum hava til stuðuls fyri kravinum m.a. gjørt galdandi, at hagin er javnt góður, og at Fjallið tí, ístaðin fyri uml. 160 ha, eigur at fáa 174 av samlaðu víddini uppá 440 ha, svarandi til býtið eftir upprunaliga uppskotinum hjá Útskiftingarnevndini frá 24. februar 2009. Viðvíkjandi innangarðsbýtinnum verður gjørt galdandi, at býtast eigur, eins og upprunaliga skotið upp av Útskiftingarnevndini, eftir gamlari siðvenju um, at yvirliggjandi

hagi eigur undirliggjandi bø. Við núverandi býti er, uttan nærri grundgeving, minkað burturav vetrarbitinum hjá Fjallinum, hóast tørvurin hjá Fjallinum fyri vetrarbiti uppá seg er størri, enn hjá Ambadali. Ein stórur partur av áseyðunum hjá Ambadali liggja alt árið á Ambadali, meðan allur seyður hjá Fjallinum má heim um veturin. Haraftrat hevur úrskurðurin hjá Útskiftingarnevndini við sær, at markið krossar koyrivegin í bygdum øki í tveimum støðum, meðan upprunauppskotið krossar vegin, tá hann fer vestureftir í óbygt øki.

Eigararnir í hagapartinum Ambadali hava til stuðuls fyri kravinum m.a. gjørt galdandi, at við núverandi býti er úrtøkan fyri hvønn gyllin í Ambadali væl minni enn í Fjallinum. M.a. liggur umleið ¼ av víddini í Ambadali omanfyri 470 metra hædd. Sandsdalur og Sandfelli eru øki við lítlum grasvøkstri, eins og Skorðarnar ikki verða brúktar. Tikið er heldur ikki við úrskurðinum hjá Útskiftingarnevndini hædd fyri, at Ambadalur er óhøgligari at reka, eins og neyðugt er at fóðra meira um veturin. Ein stórur partur av seyðinum er í haganum alt árið, og vandi er fyri í ringum veðri at missa nógvan seyð. Útskiftingarnevndin hevur við víddarrokningini av innangarðsjørðini heldur ikki tikið við "Byrgið", sum ikki er matrikulerað sum innangarðs jørð, men sum frá gamlari tíð hevur verið brúkt sum vetrarbit, eins og ein partur er velt. Kavin liggur eisini longri í bønum, ið er lagdur til Ambadal sum vetrarbit, soleiðis at størri tørvur er á at fóðra. Eftir kravda býtinum verður portrið, sum eftir verandi úrskurði má vera við rættina, flutt longur út eftir Byrgisvegi, og kemur ikki í sama mun at tarna ferðsluni.

**Grundgeving og úrslit hjá Yvirútskiftingarnevndini:**

Nevndin heldur viðvíkjandi uttangarðs jørðini, eftir at hava gingið í høgunum, at hagarnir sum heild mugu metast sum javnt

góðir. Ambadalur er partvíst vátlendi, har ikki nógvur seyður gekk, men sum tó kortini má metast at hava virði, eisini sum vetrarhagi. Eftir úrskurðinum hjá Útskiftingarnevndini hevur Ambadalur fingið tillutað ein størri part av "Gilinum á Rivinum", sum kann viga upp ímóti nevndu vansum við váta lendinum í Ambadali. Viðvíkjandi grýtutum lendi ella lendi við lítlum vøkstri heldur nevndin ikki, at grundarlag er fyri at halda, at annar parturin, uppá seg, hevur fingið tillutað ein lutfalsliga ov stóran part.

Nevndin metir sostatt ikki, at grundarlag er fyri at broyta úrskurðin hjá Útskiftingarnevndini viðvíkjandi uttangarðs jørðini.

Tað av eigarunum í Ambadal nevnda um raksturin av Ambadali kann ikki føra til eitt annað úrslit. Nevndin heldur, at hagarnir, hóast ikki eins høgligir, báðir eru høgligir, eins og tað verður lagt til grund, at neyðugt er at fóðra um veturin, uttan mun til um seyðurin verður tikin heim, ella liggur í haganum alt árið.

Viðvíkjandi innangarðsbýtinum er nevndin samd við Útskiftingarnevndini um at víkja frá vanligu meginregluni, hareftir yvirliggjandi hagi hevur undirliggjandi bø. Dentur er lagdur á støddina av hóskandi vetrarbiti í høgunum, herundir at "Byrgið", sum eftir úrskurðinum hjá Útskiftingarnevndini er fallið í lut hjá Fjallinum, má metast sum serliga gott lendi til vetrarbit.

Við verandi býti er víddin á innangarðsjørðini rættiliga væl í samsvar við markatalið. Grundarlag er ikki fyri - umframt tað omanfyri nevnda um virðið á "Byrginum" sum vetrarbit - eisini at rokna "Byrgið", sum er matrikulerað sum hagi, við í býtinum av vetrarbitinum innangarðs.

Eftir úrskurðinum hjá Útskiftingarnevndini gongur markið tvørtur um rættina (matr. nr. 46) og koyrivegin bæði omanfyri og niðanfyri rættina. Hóast loysnin soleiðis kann tykjast óheppin, er talan í høvuðsheitum um viðurskifti, sum viðvíkja ferðsluni í bygdini, og sum eisini viðvíkja øðrum, enn pørtunum í málinum, herundir eftir tí upplýsta "Gjáargarð".

Undir hesum umstøðunum, og tá rættin og omanfyri liggjandi geilin skulu brúkast av báðum pørtum, finnur nevndin ikki fult nøktandi grundarlag fyri at seta til viks úrskurðin hjá Útskiftingarnevndini hesum viðvíkjandi.

Úrskurðurin hjá Útskiftingarnevndini verður tí staðfestur í síni heild.

Viðvíkjandi gildiskomu og kostnað verður ásett, sum niðanfyri tilskilað.

T í v e r ð u r á s e t t:

Úrskurðurin hjá Útskiftingarnevndini verður staðfestur.

Skiftið fær gildi tann 1. november 2010.

Málskostnaðurin skal eftir nærri uppgerð hjá formanninum gjaldast samsvarandi § 59 í útskiftingarlógini.

Jørleif Kúrberg — Oddvør Johannesen

Heini á Heygum — Eyðfinnur S. Hansen

Jóannes Madsen